**sosialurin** (tíðindablaðið)
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin



# Áhugavert orðaskifti á tingi

Oddagrein

Orðaskiftið á tingi um almennu roknskapirnar var sera áhugavert og yvirhøvur rættiliga sakligt. Tað var upplýsandi og kastaði ljós á nógvar ivaspurningar, men samstundis standa eftir nakrir sera álvarssamir spurningar, sum almenningurin hevur krav at fáa svar uppá. Orðaskiftið og fyri alt tað eisini tilfarið frá løgtingsgrannskoðarunum avdúkaði, at næstan allir landsstýrismenn hava havt meirnýtslur á sínum økjum tey seinastu fimm árini.

Víðari vísti orðaskiftið, at als eingin munur er á málinum um Sjónvarp Føroya og tí um Strandferðsluna. Hetta gongur jú beinleiðis fram av tilfarinum, og varð lisið upp frá røðarapallinum. Hesin veruleiki reisir spurningin, hví so stórur munur verður gjørdur á hesum báðum málum. Er tað tí at sjónvarpið er ein miðil, ið øll hava eina meining um og sum vekir agressiónir hjá ávísum politikarum ella er tað tí, at hetta passar pørtum av Tjóðveldisflokkinum væl? Eitt er vist, leiklutur Tjóðveldisfloksins er meira enn løgin í hesum máli. Eisini er tað sera løgið, at fíggjarmálaráðharrin ikki tók lut í orðaskiftinum og greiddi tinginum frá leikluti fíggjarmálastýrisins í málinum. Hetta er løgið so mikið meira sum, at fíggjarmálastýrið samb. galdandi mannagongdir hevur verið djúpt inni í hesum máli, hevur vegleitt Signar á Brúnni og hevur avgreitt hetta mál saman við Signar á Brúnni.

Tá hetta er sagt eigur tað eisini at verða víst á, at orðaskiftið avdúkaði, at frágreiðingin frá løgtingsgrannskoðarunum ikki tykist geva eina heilt rætta mynd av tí, ið er farið fram í málinum. Tann, ið lesur frágreiðingina um Sjónvarpið, leggur til merkis, at samanhang er ikki millum frágreiðing og niðurstøður. Í frágreiðingini tykist tað sum, at landsstýrismaðurin og umsiting hansara hava handlað eftir bókini td. við alt fyri eitt at fara undir at útvega sjónvarpinum eykajáttan. Hinvegin stendur í niðurstøðunum, at landsstýrismaðurin fór ikki undir hetta arbeiði fyrr enn í september. Í øðrum førum verður landsstýrismaðurin í mentamálum í niðurstøðunum lastaður fyri nakað, ið ikki hann, men landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur ábyrgdina av. Hetta er løgið, og almenningurin hevur rætt til at fáa eina frágreiðing um, hví hetta ósamsvar er millum frágreiðing og niðurstøður. Grannskoðarafrágreiðingin um SvF og orðalagið um landsstýrismannin í mentamálum er óvanliga hvassorðað og atfinningarsom. Hví er frágreiðingin ikki eins hvassorðað og atfinningarsom, tá talan er um SL og landsstýrismannin í vinnumálum?

Fleiri tingmenn settu spurningin, hvat hevði hent, um landsstýrismaðurin ikki útvegaði sjónvarpinum gjaldføri 23. juli 99. Hetta er ein sera áhugaverdur spurningur, og áhugavert er tað eisini, at fleiri tingmenn vildu vera við, at atfinningarnar móti landsstýrismanninum í hesum føri vildu havt verið eins harðar og tær eru nú. Hetta snýr seg um stóra spurningin, ið løgmaður sjálvur hevur reist í samrøðu við Sosialin, og sum fleiri tingmenn reistu: hevði Signar á Brúnni nakað val? Kundi hann í roynd og veru gera annað, enn at ganga eftir galdandi játtanarreglum og leggja peningin út, soleiðis sum umstøðurnar vóru? Men ivi er sáddur um hesa avgerð landsstýrismansins, og hann hevur sjálvsagt rætt til at fáa henda spurning avkláraðan. Sama er galdandi fyri aðrar landsstýrismenn, sum helst hava gjørt tað sama sum Signar á Brúnni. Málið sjálvt tikist nú væl lýst, og tí er ikki neyðugt við nakrari umfatandi kanning av SvF ella av embætisførsluni hjá Signar á Brúnni sum heild. Heldur eiga vit at fáa ein óheftan løgfrøðing at gera eina løgfrøðiliga meting av tí avgerð, sum ivi er sáddur um.

Allir flokkar eiga at duga at síggja, at ein hvør landsstýrismaður uttan mun til flokspolitiskan lit kann koma í somu støðu sum Signar á Brúnni. Tí eiga tingmenn at kunna semjast um at útvega Signari á Brúnni og almenninginum eina løgfrøðiliga meting. Alternativið er, at almenningurin má krevja eina víttfevnandi kanning av øllum meirnýtslum, ið umtalaðar eru í frágreiðingunum, sum nú liggja á tingborði.

Sosialurin

Viðmerking:

# Rættleiðing til Dimmalætting

Mikudagin 12. apríl skrivar Dimmalætting undir yvirskriftini *»Fíggjarmálastýrið segði nei til eykajáttan til SvF«* um spurningin um eykajáttan til SvF. Greinin byggir á eitt bræv frá Fíggjarmálastýrinum, dagfest 15. juli 1999 til Undirvísingar- og Mentamálastýrið. Tíverri hevur greinskrivarin misskilt hetta brævið.



Av greinini kann ein lesari, sum ikki kennir hetta mál, fáa ta fatan, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið fyrst í juli 1999 hevði biðið Fíggjarmálastýrið um loyvi at geva SvF atgongd til gjaldføri landskassans og fingið nei. Hetta er ein misskiljing.

Tað, sum Dimmalætting umtalar, snúi seg um møguleikan at útvega SvF heimild til at taka ein kassakreditt. Hesin møguleiki varð av Fíggjarmálastýrinum útilokaður við brævinum frá 15. juli 1999.

Fíggjarmálastýrið staðfesti í skrivi dagfest 19.07.99 til Undirvísingar- og Mentamálastýrið, at landskassin var bundin av halli sjónvarpsins 1998 og av teimum bráfeingis skyldum, sum sjónvarpið hevði pr. dags dato. Í sama skrivi varð mælt Undirvísingar- og Mentamálastýrinum til at søkja um eykajáttan og varð hetta gjørt sama dag. Fíggjarmálastýrið segði ikki nei, men ja til eykajáttan, og tað sama gjørdi ein samdur landsstýrisfundur tann 19.juli 1999.

Men, sum kunnugt, varð fíggjarnevndarskjalið (umsóknin um eykajáttan) uttan viðgerð avvíst av fíggjarnevndini tann 21. juli 1999. Nú var talan um neyðstøðu, tí *»landskassin var bundin av teimum bráfeingis skyldum sum SvF hevði«*. Landsstýrismaðurin í mentamálum gav tí SvF atgongd til gjaldføri landskassans. Hetta var gjørt við støði í galdandi játtanarreglum.

*Tórshavn 12. apríl 2000*

**Jóannes Dalsgaard**

# Ein gysari um eitt landsstadion

Tað var einaferð ætlanin at gera eitt landsstadion í einum lítlum landi.

Hetta skuldi verða flaggskipið innan ítróttarøki í landinum og skuldi tískil sjálvandi liggja í ítróttarmiðdeplinum í høvuðsstaðnum. Har vóru planir lagdur um hvussu hetta stásiliga far skuldi síggja út. Har skuldi sjálvandi vera ein fótbóltsvøllur, og eins sjálvandi skuldi tað verða rennibreyt við tí sum hartil hoyrir.

Farið var í gongd við arbeiði og fyrsta stig var at seta eina nevnd. Henda nevnd var sett av býráðnum í høvðusstaðnum. Í nevndina vóru 4 mans (ongin kvinna) valdir. Og fyri at tað ikki skuldi henda at tað stóð á jøvnum um hesir menn vóru ósamdir so var avgjørt at um tað stóð á jøvnum so skuldi formansins atkvøða verða tann avgerðandi.



Hvør skuldi nú manna hesa nevnd? Forsetin í landinum slapp at velja ein mann, ítróttarsambandið ein mann, fótbóltsambandið í landinum ein mann og býráðið valdi so formannin. Hvussu við tí frælsa ítróttinum?

Hví fekk hann ongan sess? Nú var so at ein stemma var til frama fyri fótbóltin, tað var tí hann var valdur at sita har. Men hvønn valdi býráðið so at umboða sínar borgarar? Teir valdu formannin í tí størsta fótbóltsfelagnum til henda post. Sostatt høvdu hesir báðir menn, formaðurin í fotbóltsambandinum og formaðurin í tí lokala fótbóltsfelagnum merilutan í nevndini óansæð hvat hinir báðir mennirnir søgdu ella gjørdu. Og tað vísti seg skjótt at nevndin var tvídeild, tveir ímóti tveimum. Og Fótbóltsáhugin vann frama, mundið tað verða hetta sum var ætlanin frá býráðsins síðu? Var tað tí at býráðið hevði valt ikki at lata tann frælsa ítróttin verða við í nevndini sum 5 maður?

Nevndin fekk sær ein sakførara sum slíkar nevndir nú einarferð hava tørv á av og á. Her valdi nevndin so at takað sær tann sakførarin, sum samstundis var formaður í stuðulsfelagnum hjá tí áðurnevnda fótbóltsfelag.

Nú skuldi so fígging skaffast. Har var søkt hjá bæði land og býráð. Landið játtaði við lóg ein ávísan procentsats til gerð av fótbóltsvølli og rennibreyt. Býráðið játtaði eisini ein prosentsats av samlaða kostnaðinum til hesa somu ætlan. So var nakað skaffað við sponsorum frá ymsum stórum fyritøkum í landinum. Enn restaði nakað av peningi í, og hesin skuldi so lænast onkustaðni. Og hvar fer man tá man manglar pening? Man valdi at læna pening frá Stuðulsfelagnum hjá tí nú fleiri ferðir nevnda fótbótlsfelag og har lænti man tað, ið restaði í. Og so var farið í gongd við arbeiðið. Men enn var rennibreyt við í ætlanini, men hetta var ikki við formansins góða vilja, tí hann úttalar alment at hann ikki dámdi at tað skuldi gerast rennibreyt um fótbóltsvøllin. Henda rennibreyt sum sá út til ongan góðan at eiga, á teimum støðum har avgerðir vóru tiknar.

Tá ein tíð er liðin og fótbóltsvøllurin er gjørdur við nøkrum »fyribils« áskoðaraplássum og ongari rennibreyt. Tá kemur brádliga eitt tilmælið frá tí avvarandi nevndini í býráðnum um at taka rennibreytini úr ætlanini, sambært formanninum, tí at hann ikki heldur tað er pláss fyri henni. Sum sagt so gjørt. Men hvør er hesin formaðurin? Jú hann er tann maðurin sum hevur tikið yvir sum formaður í tí lokala fótbóltsfelagnum, eftir tann mannin sum enn situr sum formaður í tí nevndini sum er við at gera vøllin.

Av tí at rennibreytin verður tikin úr ætlanini so vendur landið sær til vøllin og gerð vart við at peningurin sum landið játtaði var játtaður til eitt stadion við bæði rennibreyt og fótbóltsvølli, og tá tað nú ikki er ætlanin at gera rennibreyt longur, so verður grunnurin biðin um at gjalda hendan pening aftur. Hetta førir við sær at grunnurin fer á húsagang.

Býráðið vil ikki taka um endan, tí at tað heldur at nokk peningur er brúktur til hetta endamál, tískil fær tann sum hevur flest pengar útistandandi vøllin til ognar, og er hetta stuðulsfelagið hjá tí lokala fótbótlsfelagnum.

**Heri Ziska**

Nú kanst tú aftur handla í Loch Ness



Atlantic Airways flýgur nú aftur til Skotlands. Tvær ferðir um vikuna til Aberdeen og í summar eisini einaferð til Glasgow. So hevur tú handilsørindi ella tú ætlar tær at ferðast, so kundi tú eisini vitja Loch Ness vatnið við tí víðagitna Loch Ness ódjórinum. Og hvør veit, kanska verður tað tú, sum prógvar, at tað veruliga er til.

**Handilsferðir:**
Far úr Føroyum sunnudag kl. 17.30 og kom aftur fríggjadag kl. 10.10

**Frítíðarferðir:**
Far úr Føroyum hóskvøld kl. 17.30 og kom aftur mánamorgun kl. 10.10



Eisini er lætt at koma víðari til London. Í ferðafaldara okkara "Út í heim", eru hópin av tilboðum til Skotlands og London.

Atlantic Airways
TEL 333 900 · FAX 333 380